Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í landbúnaðarmálum

Evni: Gjaldsportur

Spurningar:

1. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er í lagi, at gjaldsportur eru ella verða sett upp í føroysku náttúruni?
2. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera við gjaldsportrið, sum er sett upp í Saksun?

Viðmerkingar:
Undanfarni landsstýrismaðurin segði í svari 1. juni í fjør í grein 52a fyrispurningi nr. 149/2020, «at gjaldportrið, sum síðan á sumri 2019 hevur forðað fyri atgongd at strondini í Saksun, ikki er í samsvari við vanliga fatan av rættinum til atgongd at strondini. Tað ber eisini til at siga, at gjaldportrið neyvan er lógligt, tí tað forðar fyri atgongd at øki, har ein og hvør hevur rætt til at ferðast."
Hóast hetta svar er gjaldsportrið framvegis ikki tikið niður, tí er áhugavert at vita, hvat landsstýrismaðurin ætlar at gera við hetta.

Á Løgtingi, 29. apríl 2022

Beinta Løwe Jacobsen